ítróttur

Nr. 50 • mikudagur • 13. mars 2002 • 76. árgangur • www.sosialurin.fo

# Fok hevði fimleika-framsýning



*Yngru íðkararnir í fimleikafelagnum Fok sýndu fram í høllini á Kambsdali um vikuskiftið. Nógv fólk var og hugdi*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

FIMLEIKUR
*Stefan í Skorini*



Seinasta vikuskiftið hevði Fimleikafelagið Fok ta árligu framsýningina í høllini á Kambsdali. Felagið hevur níggju ár á baki, og framsýningin hevur verið hvørt ár. Fok er fimleikafelagið í Gøtu og Leirvík. Venjingin fer tó fram í Leirvík.

Fok hevur fimm ymisk lið, ið sýndu fram síni kynstur. Fok hevur umleið 150 íðkandi limir, og høllin var stúgvandi full henda dagin. Liðini framførdu bæði seriu og lop.

Komandi vikuskiftið fer fimleikafelagið í Fuglafirði, Flog, at hava sína árligu framsýning. Hon verður sunnudagin klokkan 16 í høllini á Kambsdali. Leygardagin klokkan 16 fer Flog at hava framsýning í Klaksvík. Tað er Klaksvíkar Fimleikafelag, ið hevur boðið Flogi til Klaksvíkar.

## Bragdið fingið nýggjan formann

RENNING
*Stefan í Skorini*

Robert Vilhelmsen er nýggjur formaður í Bragdinum. Týskvøldið hevði Bragdið, ítróttarfelagið fyri frælsan ítrótt í Havn, árliga aðalfundin. Formansval var á skránni, og formaðurin seinastu tíggju árini, Niels Jákup Jakobsen, ynskti ikki afturval. Í hansara stað varð Robert Vilhelmsen valdur.

Robert Vilhelmsen starvast dagliga á Elektron, og hann hevur runnið nógv kring heimin. Hann hevur eitt nú runnið marathon í Berlin og á sjálvum kinesiska múrinum.

Niels Jákup Jakobsen heldur fram í nevndini saman við Cecil Weihe, og Rigmor N. Arge er tiltakslimur. Nevndin skipar seg sjálv.

## Borðtenniskapping fyri lið

**FM- kappingar fyri lið hava verið um vikuskiftið, og úrslitini vóru hesi:**

Smápinkur:
nr.1 Sheila Strøm og Rakul Mikkjalsdóttir, TBF
nr.2 Mariann Petersen, OyÍF - Fjóla Luid, TÓR og Sára Joensen, TBF

Smápiltar:
nr.1 Gilli Sørensen, TBF og Bárður Láadal, Streymur
nr.2 Jónhard Ferjá og Fróði Jensen, TBF b
nr.3 Jákup Thomasen og Martin Midjord, TBF b

Pinkur:
nr.1 Hanna Joensen og Elsa Magnussen, OyÍF
nr.2 Susie Midjord og Rannvá Roest, TBF
nr.3 Annika Petersen, OyÍF og Jeanette Holm, Streymur

Piltar:
nr.1 Gunnar í Dali og Sjúrður Ferjá, TBF
nr.2 Reidar Luid og Rógvi Holm, TÓR a
nr.3 Tummas Justinussen og Búi Dalsgarð, TÓR b

Smágentur:
nr.1 Marin í Dali, TBF og Rakul Magnussen, Streymur
nr.2 Anntóra Láadal og Rudi Zachariassen, Streymur
nr.3 Petra Christiansen og Wivika Strøm, TBF

Smádreingir:
nr.1 Ragnar Egilson og Sigurð Carlsson, TÓR a
nr.2 Brian Hansen og Tórfinn Djurhuus, Streymur a
nr.3 John Hansen og Christian Mouritsen, TÓR b

Gentur:
nr.1 Mildrið Djurhuus og Elisa Abrahamsen, Streymur a
nr.2 Katrin Joensen og Durita Johansen, OyÍF
nr.3 Rigmor Zachariasen, Birita Joensen og Elisabeth Jacobsen, Streymur b

Dreingir:
nr.1 Rógvi Hansen og Rókur Nielsen, TÓR
nr.2 Hanus Stórhamar og Sjúrður Thorsteinsson, TBF a
nr.3 Beinir Midjord og Bjarni Kjærbæk, TBF b

Kvinnuunglingar:
nr.1 Eleonora Kerá og Vár Gaard, OyÍF b
nr.2 Maibritt Magnussen og Birita Joensen, OyÍF a
nr.3 Maria Zachariasen og Vár S. Lamhauge, Streymur



# Støkk og Havnar Fimleikafelag vunnu

**Støkk úr Runavík og Havnar Fimleikafelag vóru sigursharrar í stórkappingini, ið Fimleikasambandið skipaði fyri um vikuskiftið**



FIMLEIKUR
*Stefan í Skorini*
*Myndir: Álvur Haraldsen*

Fríggjakvøldið var stórkapping í rútmiskum fimleiki fyri lið í høllini á Hálsi. Tað vóru gentur og kvinnur, ið kappaðust. Kappast varð í tveimum serium, eini fríari og eini amboðsseriu.

Í fríu íðkanini gjørdist úrslitið hetta:

| | | |
|---|---|---|
| Nr. 1 | Støkk | 17,65 stig |
| Nr. 2 | Ljósið | 17,20 stig |
| Nr. 3 | Havnar Fimleikafelag | 16,80 stig |
| Nr. 4 | Flog | 14,75 stig |

Síðani varð kappast í amboðsseriu, har genturnar nýttu hoppibond, og úrslitið var:

| | | |
|---|---|---|
| Nr. 1 | Støkk | 16,65 stig |
| Nr. 2 | Havnar Fimleikafelag | 16,50 stig |
| Nr. 3 | Ljósið | 15,95 stig |
| Nr. 4 | Flog | 12,80 stig |

Samanlagdur vinnari og føroyameistari hjá gentum gjørdist Støkk úr Runavík. Havnar Fimleikafelag var á øðrum plássi, Ljósið nummar trý og Flog var á fjórða plássi.

### Havnin vann hjá kvinnnum

Kappingina hjá kvinnum vann Havnar Fimleikafelag. Kappast var eisini í eini fríari og eini amboðsseriu, har kvinnurnar nýttu gjarar

Úrslitið av fríu íðkanini var:

Nr. 1 Havnar Fimleikafelag 18,30 stig
Nr. 2 Ljósið 17,75 stig
Nr. 3 Støkk 17,20 stig

Úrslitið av amboðsseriuni var:

| | | |
|---|---|---|
| Nr. 1 | Havnar Fimleikafelag | 17,25 stig |
| Nr. 2 | Ljósið | 16,80 stig |
| Nr. 3 | Støkk | 15,75 stig |

Samanlagdur vinnari og føroyameistari hjá kvinnum gjørdist sostatt Havnar Fimleikafelag. Ljósið gjørdist nummar tvey og Støkk nummar trý.

Fyrireikararnir lata væl at kappingini, og nógv fólk var og hugdi. Fimleikasambandið hevði í sambandi við kappingina fingið høvuðsdómarar úr Danmark at døma um avrikini hjá liðunum.

Fimleikasambandið fegnast um, at Flog úr Fuglafirði fyri fyrstu ferð luttók í kappingini hjá gentum.





